


***Nr. 15*** ***21. juli 2013*** ***73. árg.***

# Sál mín tystir eftir Gudi

*Gud mín, eftir tær sál mín tystir – sál mín ei víkur frá tær.*
*Sálmur 63, 2 og 9.*

Sál mín – tað eri eg sjálvur, tað innasta í mær, sum ger, at eg eri eg. Sál mín, mítt hjarta er mítt aðalmerki, tað í mær, sum leingist eftir nøkrum, sum eg ikki nái. Eg eri eitt menniskja, ikki eitt dýr; tí dugi eg at skina á illum og góðum, og tí haldi eg saman hendur og líti meg í hansara hendur, sum er størri enn eg.

Summi hugsa als ikki um sál sína; tey royna at billa sær inn, at alt tos um sálina er nakað tvætl. Men tað kemur ikki av ongum, at á einum ella øðrum máli merkir orðið, sum nýtt verður um sálina ”tann bylgjandi sjógvurin.” Ófriðurin verður ikki tamdur í eini handavending. Summi látast, at tað er í lagi, men ongin veit betur enn tey sjálvi, at tað er lygn. Tey eru bangin og hava ikki hóming av, hvat tey skulu gera. ”Sál mín, hvíl teg nú!” siga tey, uttan at tað á nakran hátt hjálpir í ”bylgjandi sjónum.”

”Gud, sál mín tystir eftir tær.” Hygg sannleikan í eyguni. Tað er fyrsta treytin fyri at kunna fáa hjálp. Gevst við hasi býttu flýggjanini frá veruleikanum. Gerst sannførdur um, at tú livir undir ábyrgd, og at tú onki viðurlag kanst geva fyri sál tína! Tómleikin og óttin stava frá, at tú ert ein skuldari, sum ein dag skal gera roknskapin upp við Gud. Hvussu fer at gangast?

”Sál mín ei víkur frá tær.”Soleiðis talar trúgvin. Hon hyggur ikki í allar ættir eftir hjálp, men fer beina leið til Guds. Hon biður ikki vitið um loyvi, men brýtur sær veg, tí Jesus Kristus hevur sagt: ”Bankið uppá, so verður latið upp fyri tykkum!” Eftir orðum hansara vendir trúgvin sær til Guds og biður um frelsu.

Vanrøk ikki sál tína! Eisini fyri teg er friður at fáa, um tú vilt byrja at ganga trúarinnar veg. Játta, at sál tín tystir eftir Gudi! Játta, at tú vilt halda teg nær Gudi – kosta, hvat tað kosta vil.

# John Wesley

Hin kendi vekingarprædikanturin, John Wesley, nýtti øll høvi at bera medmenniskjum sínum ein vitnisburð. Ein dagin sat hann í einum bývogni saman við einum høgum heryvirmanni, sum tosaði skilaliga um mentan og var blíður við John; men tíverri mátti yvirmaðurin onkuntíð taka til ein dýran eið.

Tá ið teir komu til eina skiftistøð, tók John yvirmannin eitt sindur til viks og segði: ”Eg takki tygum fyri hugnaligt ferðarlag. Eg eri fegin um, at eg eri farin at kenna tygum. Mær hevur dámað ógvuliga væl at ferðast saman við tygum. Kann eg loyva mær at biðja tygum gera mær eina tænastu?”

”Tað skuldi glett meg nógv,” svaraði yvirmaðurin, ”eg eri vísur í, at tygum fara ikki at krevja ov nógv av mær, og tí tori eg at lova tygum henda beina.”

”Av tí at vit skulu koyra eitt strekki afturat,” segði John, ”vil eg fegin biðja tygum um at gera mær ta tænastu, at tygum vinaliga átala, um eg í práti okkara skuldi gloymt meg sjálvan burtur og tikið til ein dýran eið.”

Yvirmaðurin skilti hann beinanvegin. At John Wesley so vinaliga segði hetta, ávirkaði yvirmannin, soleiðis at hann gjørdist ikki illur, men goymdi orðini í hjarta sínum. Seinni, tá ið yvirmaðurin hevði tikið við kristnari trúgv, tók hann soleiðis til: ”Hvør annar enn John Wesley kundi siga hetta so kærliga og so hjartaliga?”

Mangan ræður ikki bara um at siga okkurt bart út, men at Gud gevur okkum vísdóm at siga tað á rættan hátt. Siga tað soleiðis, at kærleiki til sálir býr undir orðunum, so tað ikki vekur meinboga, og sálir ognast Gudi.

*t.* týddi.

# Seinastu orðini hjá Johan Georg I fúrsta í Sachsen

Hann sat við valdinum í 45 ár. Hetta var, meðan 30 ára kríggið herjaði. Tá ið hann sum 73 ára gamal lá til tað seinasta, kom hofpresturin, dr. Weller, inn til hansara at ugga hann. Hann boygdi seg niður yvir tann doyggjandi og spurdi við álvarsamari og mildari rødd, um hann kundi siga tað sama sum sálmaskaldið: ”Mín Jesus er mær byrjan og endi?”

Tann sjúki royndi við síni seinastu megi at seta seg upp undir seg, og lív kom aftur í tey hálvbrostnu eyguni. Hóast veikur, so var tað við gleðismerktari rødd hann svaraði: ”Mín Jesus fer ikki frá mær, og eg fari ikki frá honum.”

Við hesum orðum doyði hann.

# Sólin, sum frøir hjartað

Á einari sjúkrastovu á einum sjúkrahúsi lá ein gudsavnoktari. Ein diakonissa røktaði hann ógvuliga væl. Tá ið hann umsíðir fór av sjúkrahúsinum, var tað ikki bara ein kropsliga frískur og grøddur maður, men eisini eitt andaliga nýtt menniskja.

Hann varð spurdur, hvat henda systirin, sum hevði røktað hann, hevði gjørt, nú ið hann hevði fingið so nógv burtur úr sjúkuni.

Hann svaraði: „Hon gjørdi onki serligt. Hon var altíð glað, og tá ið eg undrandi spurdi hana, hvussu hon bar seg at at vera so still og glað í øllum hesum vesaldómi og harmi, tók hon nøkur orð úr einum sálmaørindi, tá ið hon svaraði:

*”Sólin, sum hjarta mítt frøir, hon er tú, o, Jesus*
*Og undir øllum lovsongi mínum býr,*
*at heim mítt er himmalin.*

Og tá fór eg – helt tann nýumvendi maðurin fram – at leita eftir hesi sólini.”

Tað er eisini eitt arbeiði, sum Harranum toknast, og sum kann bera mikla frukt, tá ið vit týðiliga vísa, at vit eru glað kristin menniskju.

Illa sint, trútin og gleðileys Guds børn vinna ikki menniskju fyri Harran ella geva teimum hug at tæna honum. Nei, tey kunna tykjast sum ein ávaringartalva: ”Fólk verða ávarað at nærkast!”

Men glað, hugløtt kristin fólk, sum ikki vísa út hýr ella misnøgd, fólk, sum leggja tað góða í alt, og sum ikki falla í fátt – leiða menniskju til Jesus.

*t.* týddi.

# Deyðin

Hjá trúgvandi menniskjum er deyðin eingin “burturferð”. Nei, hann er ein “heimferð”. Tí Bíblian sigur: “Burtur úr likaminum ... heima hjá Harranum.” 2. Kor. 5,8. - Deyðin verður sostatt hjálparmaðurin ella ferjan, sum Gud brúkar at føra okkum heim til sín.

Tá ið Ludvig Karlsen einaferð varð spurdur, um hann átti ein fallskíggja, svaraði hann: “Nei, eg havi ikki brúk fyri einum fallskíggja. Eg skal ikki niðureftir. Eg skal uppeftir.” Hann sipaði til endastøðina hjá sær, himmalin.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ferðapeningurin

Ein royndur sálarhirði varð einaferð biðin at koma til eina sjúka konu, sum var bangin at doyggja. Hon hevði, meðan hon hevði ligið sjúk, kunnað glett seg í Harranum, men hugsaði nú óttafull um tann seinasta tíman, sum nærkaðist skjótt.

”Er sonur tygara, Vilhjálmur farin avstað?”

”Nei, hann fer um seks vikur,” svaraði konan bilsin.

”Hava tygum longu givið honum ferðapeningin?”

“Nei, hann fær hann ikki, fyrr enn hann fer avstað.”

“Óttast hann ikki fyri, at tygum í seinastu løtu ikki geva honum peningin?”

“Nei, sanniliga. Tá ið eg lati hann fara avstað, má eg eisini geva honum ferðapeningin.”

Tá segði sálarhirðin: ”Kæra kona, Vilhjálmur er barn tygara, og tygum eru barn himmalska faðir tygara. Vilhjálmur hevur ongan ampa av ferðapeninginum, tí hann er vísur í, at tygum fara at geva honum hann. Kunnu tygum so ikki av heilum hjarta líta á himmalska Faðir tygara, at hann gevur tygum ferðapeningin, fyrsta tygum fara avstað.

*t.* týddi

# Spurvurin

Ein prestur skuldi halda jarðarferðartaluna yvir eina so fitta fýra ára gamla gentu, sum var ákoyrd. Ein maður við kenning hevði koyrt á hana.

Prestur kendi seg heilt tóman. Hann gramdi seg fyri konuni: “Tað er so høpisleyst, at hon skuldi lata lív. Eitt vaksið fólk fyllir seg við alkoholi og setir seg síðani í ein bil, sum er eitt morðvápn í hondunum á tí, sum ikki dugir at brúka hann við skili.”

“Ikki ein spurvur fellur til jarðar uttan vilja faðirs tykkara, stendur tað í Skriftini,” svaraði konan stillisliga.

Prestur fór inn í stovuna og tók eitt mannakorn. Á tí stóð: Matt. 10,29. Hann tók Bíbliuna og blaðaði upp á umrødda skriftstað. Har stóð: “Verða ikki tveir spurvar seldir fyri ein skilling? Og ikki ein teirra fellur til jarðar uttan vilja faðirs tykkara.”

Morgunin eftir, tá ið hann læt úthurðina upp, lá ein deyður spurvur á ovasta trapputrini.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74